Oktober 2018

betri

Tryggingartreytir

# Akfar undir 3500 kg

betri

# Akfar undir 3500 kg


## A. Lógargrundarlag 3

## B. Felagstreytir 3

1.0 Nær tekur tryggingin við 3
2.0 Hvønn fevnir tryggingin um 3
3.0 Hvar fevnir tryggingin um 3
3.1 Ferðsluábyrgdartryggingin 3
3.2 Føraravanlukkutryggingin 3
3.3 Skrokktryggingin 3
4.0 Tíðarskeið og uppsøgn 3
5.0 Tryggingargjaldið 3
6.0 Prístalsjavning 4
7.0 Tryggingarskipanir 4
8.0 Sjálvábyrgd 4
9.0 Vandabroyting, flyting v.m. 4
10.0 Søla av akfarinum 5

## C. Ferðsluábyrgdartrygging 5

20.0 Ferðsluábyrgdartrygging 5
21.0 Hvat fevnir tryggingin um 5
22.0 Aftursókn (regres) 5

## D. Skrokktrygging 5

24.0 Hvat fevnir tryggingin um 5
25.0 Aftursókn (regres) 6
26.0 Eykaútgerð 6
27.0 Rættarhjálp 7
28.0 Nývirðisendurgjald 7
29.0 Lyklafulnaður 7

## E. Felagstreytir 8

30.0 Tryggingin fevnir ikki um 8
31.0 Yvirsýn 8
33.0 Skaðafráboðan 8
34.0 Endurgjald fyri skaða 8
35.0 Kontant endurgjald 9
36.0 Skaðar á lakk 9
40.0 Leiguakfar til uttanlandsferð 9
42.0 Sálarfrøðilig hjálp 9
43.0 Skeiv áfylling 10
45.0 Nummarplátustuldur 10

## F. Føraravanlukkutrygging 10

50.0 Føraravanlukkutrygging 10
50.1 Hvønn fevnir tryggingin um 10
50.2 Hvar fevnir tryggingin um 11
50.3 Hvat fevnir tryggingin um 11
50.4 Hvat fevnir tryggingin ikki um 11
50.5 Endurgjald 11

betri

# Akfar undir 3500 kg

## A. Lógargrundarlag

Fyri tryggingina eru galdandi, umframt hesar tryggingartreytir og viðtøkur felagsins, tær í Føroyum galdandi lógir um tryggingaravtalur og tryggingarvirksemi.

## B. Felagstreytir

### 1.0 Nær tekur tryggingin við

**1.1** Tryggingin tekur við frá teirri løtu, tá ið ein áheitan um trygging, sum felagið góðkennir, er komin felagnum í hendi, um ikki annað er avtalað.

**1.2** Um tryggingarfelagið ikki ynskir at taka tryggingina upp á seg, letur tryggingarfelagið tryggingartakaran vita hetta, og er tá leyst av tryggingini 3 dagar eftir, at frásøgnin er framkomin. Um sovorðin frásøgn ikki verður send innan 3 dagar, eftir at áheitanin er komin tryggingarfelagnum í hendi, er tryggingin góðtikin.

**1.3** Tekur tryggingin við í staðin fyri trygging í øðrum tryggingarfelag, tekur tryggingin við frá teirri løtu, tryggingin í hinum tryggingarfelagnum heldur uppat.

### 2.0 Hvønn fevnir tryggingin um

**2.1** Tryggingin fevnir um tryggingartakaran, og tann, sum við loyvi frá tryggingartakaranum, nýtir akfarið ella er førari á tí.

**2.2** Um akfarið er latið verkstaði til umvælingar, eftirlit ella tílíkt, svarar tryggingin bert fyri skaða, tá akfarið verður nýtt í hesum sambandi.

**2.3** Um akfarið verður selt, er nýggjur eigari tryggjaður í 14 dagar eftir eigaraskifti, í tann mun onnur trygging ikki tekur við.

### 3.0 Hvar fevnir tryggingin um

**3.1 Ferðsluábyrgdartrygging**

**3.1.1** Ferðsluábyrgdartryggingin fevnir um skaðar, sum henda í Føroyum.

**3.1.2** Uttanfyri Føroyar fevnir tryggingin um skaðar, sum henda í londum (íroknað Danmark og Grønlandi), har tað grøna kortið er galdandi. Sí tó grein 9.2 e) um koyring uttanlands longri enn 3 mánaðar.

**3.1.3 Viðvíkjandi grøna kortinum**

**3.1.4** Almenna heitið á grøna kortinum er "International Motor Insurance Card". Tað er DFIM (Dansk Forening For International Motorkøretøjsforsikring), sum hevur umsitingina av kortinum.

**3.1.5** Grøna kortið er prógv fyri, at bilurin er ábyrgdartryggjaður. Í summum londum skal tað grøna kortið vísast, áðrenn koyrt verður inn í landið.

**3.1.6** Onnur lond góðkenna ikki grøna kortið, men krevja, at trygging verður teknað við markið, áðrenn koyrt verður inn í landið.

**3.1.7** Grøna kortið fæst við at venda sær til okkara.

**3.2 Føraravanlukkutrygging**

**3.2.1** Tryggingin fevnir um skaðar, sum henda í Føroyum.

**3.2.2** Uttanfyri Føroyar fevnir tryggingin um skaðar, sum henda í londum (íroknað Danmark og Grønlandi), har tað reyða og/ella grøna kortið er galdandi. Sí tó grein 9.2 e) um koyring uttanlands longri enn 3 mánaðar.

**3.3 Skrokktrygging**

**3.3.1** Tryggingin fevnir um skaðar, sum henda í Føroyum.

**3.3.2** Uttanfyri Føroyar fevnir tryggingin um skaðar, sum henda í londum (íroknað Danmark og Grønlandi), har tað reyða og/ella grøna kortið er galdandi. Sí tó grein 9.2 e) um koyring uttanlands longri enn 3 mánaðar.

**3.3.3 Viðvíkjandi reyða kortinum**

**3.3.4** Almenna heitið á reyða kortinum er "Forsikringsbetingelser for Redningsforsikring i Udlandet". Tað er SOS International a/s, sum hevur umsitingina av kortinum.

**3.3.5** Reyða kortið er í útlandinum prógv fyri, at bilurin er skrokktryggjaður.

**3.3.6** Reyða kortið fæst við at venda sær til okkara.

**3.3.7** Tryggingarfelagið kann krevja gjald fyri at skriva út grønt- og/ella reytt kort.

**3.4 Koyring uttanlands**

Tryggingarfelagið skilar sær rætt til, við 14 daga freist at broyta treytirnar fyri koyring uttan fyri Føroyar.

betri

# Akfar undir 3500 kg

## 4.0 Tíðarskeið og uppsøgn

**4.1** Tryggingin stendur við til tryggingartakarin ella tryggingarfelagið skrivliga siga hana upp við 30 daga freist til ein høvuðsgjalddag.

**4.2** Um so er, at tryggingarfelagið vegna tryggingartakaran hevur goldið t.d. MVG og sjálvábyrgd, kann tryggingarfelagið siga tryggingina upp við 14 daga freist, um so er, at hesi gjøld ikki vera goldin felagnum aftur rættstundis.

**4.3 Vantandi viðlíkahald v.m.**

**4.3.1** Tryggingarfelagið kann siga tryggingina upp við 14 daga freist, um tað tryggjaða akfarið ikki er í forsvarligum standi.

Tryggingarfelagið hevur altíð rætt til at lata tryggjaða akfarið sýna, og kann siga tryggingina upp við 14 daga freist, um tryggingartakarin sýtir fyri hesum.

**4.4 Aftaná skaða**

**4.4.1** Tá boðað er frá skaða, hava bæði tryggingartakarin og tryggingarfelagið rætt til at siga tryggingina upp við 14 daga freist, um hetta verður gjørt innan 1 mánað eftir at ein skaði er goldin ella avvístur.

**4.5 Broyting av tryggingargjaldinum og -treytunum**

**4.5.1** Ger tryggingarfelagið broytingar í tryggingargjaldinum ella tryggingartreytirnar verða broyttar, hevur tryggingarfelagið rætt til við 30 daga freist til mánaðarlok, at seta nevndu broytingar í verk.

**4.5.2** Vil tryggingartakarin ikki góðtaka eina hækking av tryggingargjaldinum ella strangari tryggingartreytir, kann tryggingin sigast upp av báðum pørtum við 14 daga freist.

## 5.0 Tryggingargjaldið

**5.1** Tryggingargjaldið fellur til gjaldingar hvørt ár frammanundan, um ikki annað er avtalað.

**5.2** Tryggingargjald verður kravt við inngjaldingarkorti. Tryggingarfelagið tilskilar sær rætt til at krevja postgjald ella annan innkrevjingarkostnað.

**5.3** Fyrsta gjaldið fellur til gjaldingar, tá tryggingin kemur í gildi, og seinni gjøld fella til ásettu gjalddagarnar.

**5.4** Verður tryggingargjaldið ikki goldið rættstundis, verður áminningarskriv sent.

**5.5** Tryggingartakarin hevur skyldu til at rinda avgreiðslugjøld fyri áminningarskriv.

**5.6** Verður tryggingargjaldið framvegis ikki goldið, verður tryggingin strikað, og møguligur veðhavari og løgregla fáa fráboðan, til tess at nummarpláturnar kunnu verða tiknan.

**5.7** Er tryggingin farin úr gildi, av tí at tryggingargjald ikki er goldið, kann nýggj trygging ikki teknast, fyrr enn eftirstøðan er goldin.

## 6.0 Prístalsjavning

**6.1** Tryggingargjaldið verður prístalsjavnað árliga við brúkara prístalinum hjá Hagstovu Føroya. Javnað verður tó altíð við í minsta lagi 1 prosenti í mun til árið fyri. Prístalsjavningin verður framd høvuðsgjalddagin.

**6.2** Heldur útgávan av almenna brúkaraprístalinum uppat, verður tryggingin prístalsjavnað við prístali, ið Betri Trygging ger/góðtekur.

## 7.0 Tryggingarskipanir

**7.1** Akfarstryggingin verður teknað sum trygging í stigum. Talan er um 11 stig.

**7.2** Tá eitt tryggingarár er umliðið, og eingin skaði hevur verið, lækkar tryggingargjaldið við einum stigi, til komið er á bíligasta stig. Tryggingarárið verður roknað frá tí høvuðsgjalddegi, sum stendur í tryggingarskjalinum.

**7.3** Tryggingargjaldið hækkar við 2 stigum fyri hvønn fráboðaðan skaða.

**7.4** Við skaða skilst hending, sum beinleiðis ella óbeinleiðis elvir tryggingarfelagnum útreiðslur.

## 8.0 Sjálvábyrgd

**8.1** Um tryggingin er teknað við sjálvábyrgd, sæst henda á tryggingarskjalinum. Sí tó § 27.0 um Rættarhjálp og § 29 um Lyklafulnað.

**8.2** Hevur tryggingarfelagið vegna tryggingartakaran goldið umvælara ella øðrum sjálvábyrgd, skal henda gjaldast felagnum aftur. Verður henda ikki goldið felagnum aftur rættstundis, verður áminningarskriv sent.

**8.3** Tryggingartakarin skal gjalda avgreiðslugjald fyri áminningarskrivið.

**8.4** Verður sjálvábyrgdin framvegis ikki goldin, kann tryggingarfelagið siga tryggingina upp við 14 daga freist.

## 9.0 Vandabroyting, flyting v.m.

**9.1** Tryggingartakarin eigur beinanvegin at siga tryggingarfelagnum frá, tá vandabroyting er, soleiðis at tryggingarfelagið kann avgera, um ella undir hvørjum treytum tryggingin kann halda fram.

**9.2** Sum vandabroyting er at rokna:
**a)** broyting av brúkinum av akfarinum,
**b)** broyting av sjálvum akfarinum,
**c)** at tryggingartakarin ella brúkari broytir bústað,
**d)** at brúkari verður ein annar enn tann, sum er nevndur í tryggingarskjalinum,
**e)** at akfarið verður brúkt uttanlands longri enn 3 mánaðir.

**9.3** Verður slíkt ikki fráboðað, kann tað sambært tryggingaravtalulógini §§ 45-50 føra við sær, at rætturin til endurgjald verður avmarkaður, ella at endurgjaldið fellur burtur.

## 10.0 Søla av akfarinum

**10.1** Verður tryggjaða akfarið selt, skal tryggingartakarin boða felagnum frá hesum beinanvegin.

**10.2** Tryggingaravtalan kann ikki flytast ella latast triðja manni.

**10.3** Óavgreiddir skaðar kunnu bert flytast ella latast triðja manni við góðkenning frá felagnum.

# C. Ferðsluábyrgdartrygging

## 20.0 Ferðsluábyrgdartrygging

**20.1** Í Føroyum veitir tryggingin endurgjald sambært teim tryggingarhæddum, sum eru nevndar í galdandi ferðslulóg.

**20.2** Uttanfyri Føroyar veitir tryggingin endurgjald sambært teim tryggingarhæddum, sum eru galdandi í viðkomandi landi.

**20.3** Tryggingarfelagið hevur heimild at gera semju í spurninginum um endurgjald.

**20.4** Tryggingartakarin hevur skyldu til at geva felagnum fulltrú til sína vegna at føra møguligt rættarmál og samráðingar.

**20.5** Umframt endurgjaldið rindar tryggingarfelagið eisini kostnað, ið stendst av endurgjaldskravinum og rentu av endurgjaldinum.

## 21.0 Hvat fevnir tryggingin um

**21.1** Tryggingin fevnir um endurgjaldsábyrgd sambært tí lóggávu, sum er galdandi í tí landi, har skaðin hendir.

**21.2 Hvat fevnir tryggingin ikki um**

**21.3** Ferðsluábyrgdartryggingin fevnir ikki um persónsskaða á føraran av akfarinum.

**21.4** Tryggingin fevnir bert um persónsskaða á tryggingartakaran, um hann ikki er førari av akfarinum.

**21.5** Skaða á lutir ella aðra ogn hjá førara, brúkara, tryggingartakara, hjúnafelaga/sambúgva hansara/hennara, ella virki, sum hesi heilt ella partvíst eiga.

**21.6** Skaða á viðfest akfar ella útbúnað.

**21.7** Skaða, sum hendir, tá akfarið er útleigað. Serstøk trygging kann tó teknast.

**21.8** Skaða, sum hendir, tá akfarið er á verkstaði, hjá umvælara, sølufólki og øðrum, sum hava akfarið til umvælingar, tænastueftirlit, sølu ella á annan hátt hava akfarið í varðveitslu, uttan so at koyringin kann sigast at hava verið neyðug til tess at røkja áhugamál tryggingartakarans.

## 22.0 Aftursókn (regres) í sambandi við ábyrgdarskaðar

**22.1** Tryggingarfelagið hevur regres móti tí, sum eftir ferðslulógini hevur ábyrgd av skaðanum, og sum hevur elvt skaðan við vilja.

**22.2** Er skaðin elvdur av grovum ósketni, verður avgjørt út frá eini meting av skyldmuninum og umstøðunum yvirhøvur, um tryggingarfelagið hevur regres, og um so er, í hvønn mun.

**22.3** Tryggingarfelagið hevur eisini regres, um so er, at skaðin er elvdur, meðan akfarið hevur verið útleigað uttan førara.

**22.4** Harumframt hevur tryggingarfelagið regres fyri peningaupphæddir, ið tað hevur havt skyldu til at lata í

endurgjaldi fyri tilburðir, sum tryggingin ikki fevnir um, ella tilburðir, sum hava verið eftir, at akfarið er selt.

## D. Skrokktrygging

### 24.0 Hvat fevnir tryggingin um

**24.1** Skrokktryggingin fevnir, við niðanfyri nevndu undantøkum, um allar skaðar á tað tryggjaða akfarið, eisini stuldur av akfarinum.

**24.2** Um akfarið bert er brunatryggjað, fevnir tryggingin um skaða sum stendst av eldi, spreinging, streymvillu og toruniðursláttri.

**24.3 Hvat fevnir tryggingin ikki um**

**24.3.1** skaðar, sum bert koma á, og eru avmarkaðir til mekaniskar og elektriskar lutir á akfarinum (so sum motor, girskipan, stýrilutir, elektroniska stýri- og eftiransingar-skipan), uttan so, at skaðin er elvdur av eldi, spreinging, streymvillu, toruniðursláttí, stuldri, herverki ella undir flutningi á ella við øðrum flutningstóli,

**24.3.2** skaðar, sum koma á akfarið ella tess lutir, undir og í sambandi við arbeiði ella viðgerð av hesum, uttan so, at skaðin er hendur av koyrsluóhappi,

**24.3.3** skaðar ella stuldur av akfari, meðan bilurin er latin verkstaði, umvælara, sølufólki og øðrum, sum hava akfarið til umvælingar, tænastueftirlit, sølu ella á annan hátt hava í varðveitslu. Tryggingin fevnir tó um hesar skaðar, um so er at skaðin er komin, tá koyrt verður, av eldi ella í bilvaskimaskinu, sí § 2.2,

**24.3.4** skaðar, sum eru hendir av veðurlagnum (so sum rustur og frostspreingingar),

**24.3.5** skaðar, sum henda av evnistroyttleika,

**24.3.6** virðisminking av akfarinum, orsakað av nýtslu, íroknað slit, steinslag í lakk, skøvur o.t.,

**24.3.7** skaðar á gummi, um motorakfarið ikki hevur fingið annan skaða, uttan so, at skaðin er elvdur av eldi, spreinging, streymvillu, toruniðursláttí, stuldri, herverki ella undir flutningi á ella við øðrum flutningstóli,

**24.3.8** skaðar á glas uttan so, at tað er brotið. Glas verður sostatt ikki skift ella umvælt av kosmetiskum orsøkum,

**24.3.9** skaðar á lakk orsakað av steinslagi. Eru fleiri støkk á skadda lutinum, sum týðiliga stava frá somu hending, er talan ikki um steinslag, men um lakkskaðar, sum tryggingin fevnir um. Sí § 36.0 um Skaðar á lakk,

**24.3.10** skaðar, um standast av koyring við ongum ella ov lítlum vatni ella olju,

**24.3.11** skaðar, sum henda, meðan bilurin verður leigaður út. Tó kann serlig trygging teknast,

**24.3.12** miss ella stuldur av brennievni,

**24.3.13** skaðar, sum eru elvdur við vitandi og vilja, av ovurhuga ella ósketni sambært tryggingaravtalulóg § 18,

**24.3.14** skaðar, sum henda, meðan akfarið var ført av persóni, sum var ávirkaður av rúsandi evnum sambært tryggingaravtalulóg § 20,

**24.3.15** skaðar, sum henda, meðan akfarið var ført av persóni, sum ikki hevði lógásett koyriprógv,

**24.3.16** skaðar, sum standast av, at akfarið hevur eitt ella fleiri dekk, sum ikki lúka tey minstukrøv, sum almennar reglur fyriskriva til mynsturdýbd smbrt. lóg ella kunngerð,

**24.3.17** Tryggingartakarin er tó fevndur av tryggingini, tá talan er um skaðatilburðir, sum nevndir eru undir §§ 24.3.13 – 24.3.16, um so er, at tryggingartakarin ikki koyrdi bilin og ikki visti, at talan var um nevndu umstøður, treytað av, at tað ikki var av grovum ósketni, at hann ikki visti um hesi viðurskifti.

Tryggingartakarin er tó ikki fevndur av tryggingini í hesum førum:

**a)** tá hjúnafelagi/sambúgvi tryggingartakarans ella brúkar-ans var førari,

**b)** tá onkur av børnum tryggingartakarans ella brúkarans, sum búgva heima, var førari,

**c)** tá tann, sum sambært tryggingarskjalinum er brúkari, var førari.

**24.3.18** Tryggingin fevnir bert um stuldur úr akførum, um tey eru forsvarliga læst. Tað er ein treyt, at tað sæst tekin á akfarinum um, at tað er brotið upp við makt.

### 25.0 Aftursókn (regres) í sambandi við skrokkskaðar

Hevur tryggingarfelagið havt skyldu til at rinda endurgjald

fyri ein skaða, sum ikki er fevndur av skrokk-/eldtryggingini, hevur tryggingarfelagið regres móti skaðavoldaranum, sum hevur ábyrgdina.

## 26.0 Eykaútgerð

**26.1** Umframt fyri sjálvt akfarið verður endurgjald veitt upp til ta tryggingarhædd (íroknað íseting, arbeiðsløn og MVG), sum er nevnd í tryggingarskjalinum, fyri eykaútgerð.

Tryggingin fevnir bæði um festa og leysa/avmonteraða eykaútgerð.

**26.2** Fest eykaútgerð er:
Festir eykalutir, radio, fløguspælarar, alufelgur, serligar lakkeringar, lækkingarútgerð, spolarar, gáttir, innrætting, tekstir, myndir e.t.l., sum er málað, límað ella á annan hátt fest á akfarið. Tað at ein lutir er fest eykaútgerð, merkir, at hann er forsvarliga festur í akfarið.

**26.3** Leys eykaútgerð er:
Útgerð og tilhoyr til tryggjaða akfarið, sum annaðhvørt er avmonterað ella ikki fest. Talan kann t.d. vera um vetrar- og summardekk, eykalutir og amboð, ið einans verða nýtt til tryggjaða akfarið.

Í sambandi við innbrot, er tað ein treyt fyri endurgjaldi, at lutirnir eru í forsvarliga læstum akfari/rúmi. Tað er ein treyt, at tekin vísa, at brotið er upp við makt.

**26.4** Talan er um 1. risikotrygging. Hetta merkir, at undirtrygging ikki verður gjørd galdandi.

## 27.0 Rættarhjálp

**27.1** Tryggingin fevnir um rættarhjálp.

**27.2** Fulnaður verður veittur fyri tær útreiðslur, ið tryggjaði hevur av sakarmálskostnaði í sambandi við ávís privat rættartrætumál, sum kunnu leggjast fyri ein dómstól ella ein gerðarrætt. Tað er ein treyt, at tryggjaði er partur av málinum, sum eigari, brúkari ella førari av tryggjaða akfarinum.

**27.3** Eigur ein vinnufyritøka akfarið, verður einans veitt endurgjald fyri trætumál, ið viðvíkja persónskaða, sum er hendur í sambandi við koyring við tryggjaða akfarinum.

**27.4** Tryggingartreytir fyri Rættarhjálp eru eins í øllum tryggingarfeløgum, og eru tað tær galdandi tryggingartreytirnar, ið eru grundarlag fyri fulnaðinum. Tryggingartreytirnar verða útflýggjaðar eftir áheitan.

**27.5** Endurgjaldið kann í mesta lagi vera kr. 100.000 og sjálvábyrgdin er 10% av útreiðslunum – tó í minsta lagi kr. 2.500.

**27.6** Fyri at fáa rættarhjálp skalt tú seta teg í samband við ein advokat. Tað er ein treyt fyri endurgjaldi, at advokaturin vil átaka sær málið, og at treytirnar fyri fríari rættarførslu eru loknar. Advokaturin skal síðani – áðrenn onnur stig verða tikin – lata tryggingarfelagnum eina nærri frágreiðing um málið.

**27.7** Goldið verður ikki fyri vanliga ráðgeving frá advokati.

## 28.0 Nývirðisendurgjald

**28.1** Tryggingartakarin hevur rætt til eitt endurgjald, ið svarar til kostnaðin fyri eitt tilsvarandi verksmiðjunýtt akfar av sama merki, slagi og árgangi sum tað skadda, um:

**28.1.1** umvælingarkostnaðurin er hægri enn 50% av nývirðinum á akfarinum,

**28.1.2** skaðin er hendur innan fyrsta árið við fyrstu skráseting,

**28.1.3** skadda akfarið var verksmiðjunýtt, tá tryggingin varð teknað.

**28.2** Møguligur avsláttur, sum tryggingarfelagið kann fáa við keyp av nýggjum akfari, verður ikki goldin tryggingartakaranum.

**28.3** Nývirðisendurgjaldið fevnir eisini um demobilar. Tað er tó ein treyt fyri at demobilar kunnu verða mettir sum verksmiðjunýggir, at teir:
**1.** Í mesta lagi hava koyrt 3000 km.
**2.** Eru yngri enn 3 mánaðir frá fyrstu skráseting
**3.** Einans hava verið nýttir sum demobilar.

## 29.00 Lyklafulnaður

**29.1** Tryggingin fevnir um lyklafulnað.

**29.2** Tryggingin veitir endurgjald, tá lykil til tryggjaða akfarið verður stolin ella mistur.

**29.3** Tað er ein treyt fyri endurgjaldi, at tryggjaði annaðhvørt eigur akfarið ella er skrásettur sum brúkari, og at akfarið hevur føroyskar nummarplátur.

# Akfar undir 3500 kg

**29.4** Endurgjaldið fevnir um tær útreiðslur, ið tryggjaði hevur av at fáa til vega ein nýggjan lykil, svarandi til tann, sum varð stolin/burtur.

**29.5** Endurgoldið verður bert fyri ein skaða um árið og í mesta lagi við kr. 4.000 árliga.

**29.6** Tryggingin veitir ikki endurgjald:
**a)** Tá lyklarnir eru stolnir ella mistir, sum ein fylgja av eini gerð, ið tryggjaði sjálvur hevur framt við vilja ella við sviki.
**b)** Um lyklarnir eru mistir, sum ein fylgja av at tryggjaði er farin fram við grovum ósketni.
**c)** Tá lyklarnir hvørva orsakað av at myndugleikarnir leggja hald á akfarið.

**29.7 Karenstíð**
Tryggingin tekur við 8 dagar eftir, at hon er komin í gildi.

**29.8 Sjálvábyrgd**
Eingin sjálvábyrgd er galdandi fyri lyklafulnaðin.

## E. Felagstreytir

### 30.0 Tryggingin fevnir ikki um skaða, sum er elvdur av

**30.1** kríggi, krígslíknandi tilburðum, uppreistri, skaðagerðum elvdar av uppøstari mannamúgvu,

**30.2** verkfalli ella verkbanni,

**30.3** jarðskjálvta ella øðrum náttúrutilburðum,

**30.4** útloysing av atommegi ella radioaktivum kreftum, uttan mun til um hetta er beinleiðis ella óbeinleiðis orsøk til skaðan, um ikki so er, at tryggingartakarin kann prógva, at skaðin er ikki elvdur av nøkrum av nevndu tilburðum,

**30.5** ella er hendur undir lendis- og rasarakoyring ella venjing til tílíka koyring, umframt alla koyring á breyt ella øki, sum er avbyrgt til endamálið,

**30.6** spreingievni, sum akfarið førir, uttan mun til um spreingievnið var orsøk til skaðan ella økti um hann.

### 31.0 Yvirsýn

**31.1** Er tvídráttur um skaðauppgerðina, kunnu tryggingartakarin og tryggingarfelagið avtala at lata skaðauppgerðina avgera av óheftum metingarmonnum.

**31.2** Metingarmenninir skulu, áðrenn teir fara til verka, velja ein uppmann, sum eisini skal vera óheftur. Koma teir ikki ásamt um uppmann, velur sorinskrivarin hann.

**31.3** Metingarmenninir gera uppgerðina í neyvum samsvari við ásetingarnar í tryggingartreytunum og -skjalinum og gera eina skrivliga frágreiðing um, hvussu teir hava gjørt tapið upp.

**31.4** Yvirsýnið er endaligt og bindandi fyri báðar partar. Koma metingarmenninir ikki ásamt um skaðauppgerðina, er tað uppmaðurin, ið innan fyri rammurnar av tí, ið metingarmenninir eru komnir til, skal gera úrskurð í málinum. Avgerð hansara er tá endalig og bindandi fyri báðar partar. Metingarmenninir avgera somuleiðis, hvussu kostnaðurin av yvirsýninum verður at býta millum partarnar.

### 33.0 Skaðafráboðan

**33.1** Skaði ella óhapp, sum kann føra endurgjaldskrav við sær, skal fráboðast felagnum beinanvegin. Fráboðanin skal vera so fullfíggjað sum gjørligt.

**33.2** Um akfarið verður stolið, eldur kemur í tað, ella tá ið skaði er orsakaður av ferðsluóhappi, stuldri ella herverki hevur tryggingartakarin skyldu at melda tað til løgregluna.

**33.3** Tryggingartakarin kann ikki uttan felagsins samtykki taka avgerð um endurgjald ella umvæling av skaða. Smærri umvælingar kunnu tó gerast, um tað vildi verið ólógligt ella skilaleyst at nýtt akfarið.

### 34.0 Endurgjald fyri skaða

**34.1** Tryggingin veitir endurgjald upp til ta peningahædd, sum akfarið er vert, tá ið skaðin hendi.

**34.2** Tryggingarfelagið hevur rætt til antin at javna skaðan við peningagjaldi í hondina ella lata akfarið ella tess einstøku lutir umvæla ella gera av nýggjum.

**34.3** Tryggingarfelagið hevur rætt til at gera av, hvar skaðin skal sýnast og umvælast.

**34.4** Meirútreiðslur av umvælingini orsakaðar av, at arbeitt verður út um vanliga arbeiðstíð, verða ikki goldnar.

**34.5** Tryggingarfelagið afturrindar útreiðslurnar av at flyta tað skadda akfarið til nærmasta umvælingarstað.

**34.6** Tryggingarfelagið rindar einans fyri umvæling av

skaddu lutunum. Sum dømi kann nevnast, at tryggingarfelagið ikki endurrindar fyri litmun aftaná lakering ella mun á felgum aftaná umvæling ella útskifting av eini ella fleiri felgum.

**34.7** Tryggingin hevur ikki ábyrgdina av, at eykalutir, sama slag sum teir skaddu, ikki kunnu útvegast.

**34.8** Minkar handilsvirðið á akfarinum av umvælingini ella skaðanum, verður henda virðisminking ikki endurgoldin.

**34.9** Hevur umvælingin við sær, at akfarið verður í betri standi enn frammanundan (t.d. at bøtt verður um tering ella slit), skal tryggingartakarin sjálvur rinda tann partin av umvælingarútreiðslunum, sum svarar til virðishækkanina.

**34.10** Tryggingarfelagið kann ikki ábyrgjast fyri brek við arbeiðinum, sum verkstaðið hevur ábyrgdina av.

**34.11** Hendir skaði, meðan akfarið er latið verkstaði ella umboði til umvælingar ella sølu, skal umvælingin, sum kann fara fram á verkstaði hjá hesum, verða gjørd til nettoprís. Skaðar, sum verða umvældir á øðrum verkstøðum, verða goldnir við tí upphædd, sum skaðaelvandi verkstaðurin vanliga má gjalda fyri slíka umvæling av tilsvarandi akfari.

**34.12** Er tryggingartakarin MVG-skrásettur, er endurgjaldið uttan MVG.

## 35.0 Kontant endurgjald

**35.1** Er skaðin so stórur, at tryggingarfelagið heldur, at umvælingin loysir seg ikki, ella er akfarið stolið ella rænt og er ikki afturfingið innan 30 dagar, eftir tað at løgreglan er fráboðað, verður endurgjaldið sett til virði av tilsvarandi akfari.

**35.2** Tó kann endurgjaldið verða lækkað, tá hædd verður tikin fyri fyrimun av gjalding í hondina, avskriving vegna slit, aldri, broytingum ella undanfarnum skaðahendingum.

**35.3** Tryggingarfelagið kann velja, um tað vil taka við tí skadda akfarinum ella draga virðið av vrakinum frá í endurgjaldinum.

## 36.0 Skaðar á lakk

**36.1** Skaðar á lakk verða endurgoldnir soleiðis:

| Aldur í árum | Koyrdir km | Endurgjald í % |
|---|---|---|
| 0-1 | - | 100 |
| 1-2 | - | 100 |
| 2-3 | - | 100 |
| 3-4 | 40.000 | 90 |
| 4-5 | 60.000 | 80 |
| 5-6 | 80.000 | 70 |
| 6-7 | 100.000 | 60 |
| 7-8 | 120.000 | 50 |
| 8-9 | 140.000 | 40 |
| 9 og eldri | 160.000 og fleiri | 30 |

**36.2** Endurgjaldið lækkar, tá onnur av teimum báðum ásetingunum í 1. ella 2. rað er lokin.

**36.3** Dømi:
**1.** Eitt akfar, sum er 3½ ára gamalt og hevur koyrt 50.000 km, fær 90% í endurgjaldi fyri lakkskaðar.
**2.** Eitt akfar, sum er 3½ ára gamalt og hevur koyrt 100.000 km, fær 60% í endurgjaldi fyri lakkskaðar.

**36.4** Goldið verður bert fyri tann partin av akfarinum, sum er skaddur.

## 40.0 Leiguakfar til frítíðarferð uttanlands

**40.1** Tryggingin fevnir um útreiðslur at leiga annað akfar, um so er, at akfarið hjá tí tryggjaða verður skatt í Føroyum, og sum skrokktrygging fatar um, og tí ikki kann gera ferðina. Endurgjald verður bert latið, um ferðatrygging er teknað hjá Betri Trygging.

**40.2** Tryggingin fevnir bert um útreiðslur av leiguakfari í sambandi við skrokkskaða, sum er hendur aftan á at ferðin er keypt.

**40.3** Tryggingin rindar billeigu upp í 2 dagar, áðrenn ferðin byrjar og til dagin eftir, at tann tryggjaði er heimafturkomin. Endurgjaldið kann ikki fara upp um kr. 25.000.

## 42.0 Sálarfrøðilig hjálp

**42.1** Treytað av læknaváttan, veitir Betri Trygging fíggjarliga hjálp til sálarliga kreppuhjálp til tey tryggjaðu, um tey koma í eina bráðfeingis sálarliga kreppu orsakað av:
**1.** At eldur ella eksplosjón var í bilinum, meðan tryggjaðu vóru stødd í bilinum.
**2.** Skaða, fevndur av tryggingini, sum hevur kostað mannalív.

**3.** At hóttandi vandi var fyri mannalívi orsakað av skaða, sum tryggingin fevndi um.
**4.** At bilurin var rændur, meðan tey tryggjaðu vóru stødd í bilinum.

**42.2** Endurgjald verður veitt fyri upp til 10 viðtalur hjá sálarfrøðingi fyri hvønn tryggjaðan pr. skaðahending.

**42.3** Endurgjald verður bert veitt fyri útreiðslur, ið tryggjaði ikki fær endurrindaðar frá øðrum, t.d. frá Heilsutrygd, sjúkratrygging, aðrari trygging ella verða endurgoldnar av almenna heilsuverkinum.

## 43.00 Skeiv áfylling

**43.1** Tryggingin veitir endurgjald, um so er, at skeivt brennievni er latið á akfarið.

**43.2** Endurgjaldið fevnir um útreiðslur til at:
**1.** tøma og reinsa brennievnistangan
**2.** lata rætt brennievni á akfarið.

**43.3** Tað er ein treyt fyri endurgjaldi, at akfari ikki er startað eftir at skriva brennievnið er latið á.

**43.4** Endurgjaldi er í mesta lagi kr. 4000 pr. skaða. Goldið verður bert fyri ein skaða árliga.

## 45.0 Nummarplátustuldur

**45.1** Tryggingin fevnir um nummarplátustuldur.

**45.2** Endurgjaldið fevnir um útreiðslurnar av at fáa til vega nýggja vanliga nummarplátu.

**45.3** Endurgoldið verður fyri ein nummarplátustuldur árliga.

**45.4** Tað er ein treyt fyri endurgjaldi, at:
**1.** Nummarplátan var fest á rættan og lógliga hátt
**2.** stuldurin er fráboðaður løgregluni
**3.** stuldurin er fráboðaður Akstovuni.

**45.5** Eingin sjálvábyrgd er galdandi

# F. Føraravanlukkutrygging

## 50.0 Føraravanlukkutrygging

Er føraravanlukkutrygging teknað, sæst hetta á tryggingar-skjalinum.

**50.1 Hvønn fevnir tryggingin um**
Tryggingin fevnir um persónskaða á tann, sum førir akfarið.

Tryggingin fevnir ikki um føraran, um hann nýtir akfarið uttan loyvi frá tryggingartakaranum.

**50.2 Hvar fevnir tryggingin um**
Sí § 3.2.

**50.3 Hvat fevnir tryggingin um**
Tryggingin fevnir um endurgjald fyri:
**a)** Tannskaða
**b)** Varandi mein
**c)** Mist vinnuføri
**d)** Miss av uppihaldara
sum eru ein beinleiðis fylgja av persónskaða orsakað av einum ferðsluóhappi við tryggjaða akfarinum.

Hevur ein ansvarligur skaðavaldari ábyrgdina av skaðanum, ella er skaðin fevndur av eini ábyrgdartrygging, eini arbeiðsskaðatrygging ella líknandi skipan, fevnir førara-vanlukkutryggingin ikki um skaðan. Tó fevnir tryggingin um møguligan mun í endurgjaldinum, tá:

**1)** Skaðin hendir uttanlands, og endurgjaldið í viðkomandi landi verður ásett lægri enn eftir føraravanlukkutryggingini.
**2)** Endurgjaldið frá øðrum ansvarligum skaðavaldara verður lækkað, tí at hesin ikki heftir fult orsakað av skuldarbýtinum.

Tryggingin veitir ikki endurgjald fyri aðrar útreiðslur ella annan miss, enn tey, ið nevnd eru undir grein a)-d).

**50.4 Hvat fevnir tryggingin ikki um**
Tryggingin fevnir ikki um, tá:
**a)** Førarin er ávirkaður av rúsdrekka, rúsevnum ella líknandi sambært Tryggingaravtalulógini § 20
**b)** førarin hevur elvt skaðan við vilja ella av grovum ósketni sambært Tryggingaravtalulógini § 18
**c)** førarin ikki hevði lóggilt koyrikort, uttan so at prógvast kann, at skaðin ikki stóðst av manglandi koyriførleika.

betri

# Akfar undir 3500 kg

**50.5 Endurgjald**
**50.5.1** Tannskaði
Goldið verður fyri rímiligar og neyðugar útreiðslur til tannviðgerð.

Goldið verður einans fyri útreiðslur, ið ikki verða endurgoldnar av øðrum, eitt nú av Heilsutrygd, vanlukkutryggingum ella øðrum.

**50.5.2 Varandi mein**
Endurgjaldið verður ásett eftir reglunum í Endurgjaldsábyrgdarlógini.

Endurgjaldið (avlamisstigið) verður ásett eftir læknaligari meting. Avlamni verður ásett í stigum og skal vera í minsta lagi 5 stig, fyri at endurgjald verður veitt. Avlamisstigið verður ásett sambært avlamisyvirlitinum hjá danska Arbejdsskadestyrelsen, tá endaligu fylgjurnar av óhappinum kunnu staðfestast. Um skaðin ikki er nevndur í avlamisyvirlitinum hjá Arbejdsskadestyrelsen, verður avlamisstigið ásett eftir, hvat slag av skaða talan er um, og hvussu umfatandi skaðin er. Í metingini verður ikki tikin hædd fyri, hvat arbeiði skaddi hevur, ella hvør sosiala støða hansara er.

Sambært reglunum í endurgjaldsábyrgdarlógini grein 4, 2. stk. lækkar endurgjaldið, um skaddi var fyltur 40 ár, tá skaðin hendi.

**50.5.3 Mist vinnuføri**
Endurgjaldið verður ásett sambært endurgjaldsábyrgdarlógini.

Um óhappið hevur við sær, at skaddi missir í minsta lagi 15% av sínum evnum til at vinna sær fíggjarliga inntøku við at arbeiða, kann hann fáa endurgjald fyri mist vinnuføri.

Endurgjaldið verður ásett eftir, hvat lønin hjá skadda var undan óhappinum, hvussu gamal skaddi var, tá óhappið hendi, og hvussu nógv vinnuføri skaddi hevur mist.

Endurgjaldið verður ásett til eina peningaupphædd, ið er:
Árslønin x 10 x mist vinnuføri í %.

Endurgjaldið verður útgoldið í einum.

Sambært reglunum í endurgjaldsábyrgdarlógini grein 9, lækkar endurgjaldið, um skaddi var fyltur 30 ár, tá skaðin hendi.

Endurgjald kann eisini verða veitt persónum, sum ikki hava veruliga inntøku. Fyri lesandi og fólk, ið gera húsligt arbeiði, verður endurgjaldið ásett eftir eini meting av peningaliga virðinum av arbeiðsmegi teirra, tá óhappið hendi.

**50.5.4 Miss av uppihaldara**
Endurgjaldið verður ásett sambært endurgjaldsábyrgdarlógini.

Hevði deyði persónurin uppihaldsskyldu fyri hjúnafelaga ella sambúgva, er endurgjaldið 30% av endurgjaldinum, sum tann deyði vildi fingið fyri at mist alt vinnuførið.
Tó er ásett, hvat ein í minsta lagi og í mesta lagi kann fáa í endurgjaldi.
Eru livandi børn, eftir tann deyða, fáa hesi eitt endurgjald, ið svarar til samlaða barnapeningin, sum tann deyði kundi verið álagdur at gjalda. Endurgjaldið verður tvífaldað, um tann deyði var einsamallur uppihaldari.

Hevði tann deyði skyldu at uppihalda øðrum enn teimum, sum nevnd eru omanfyri, verður endurgjaldið ásett eftir støddini á mista uppihaldinum.

Eingin skiftisveiting verður latin eftirsitandi, og útreiðslur til jarðarferð verða ikki goldnar.

**50.5.5 Uppafturtøka**
Mál viðvíkjandi varandi meini og mistum vinnuføri, ið eru avgreidd, kunnu takast upp aftur sambært ásetingunum í endurgjaldsábyrgdarlógini grein 11.